*– Leikararnir hugna sær, tá vit spæla álopsfótbólt, og so ger tað onki, um teir brenna brenna viðhvørt.*

*Sámal Erik Hentze, hjálparvenjari hjá EB/Streymi*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800





*Kvinnurnar umborð á danska bátinum vísa stoltar síni silvurmerki. Føroyska Katrin Olsen er næstfremst á myndini*

*Mynd: Scanpix.*

# Føroyskt silvur í HM

**Danski dupultfýrarin hevði ongan kjans ímóti kinesiska bátinum, men Katrin Olsen og tær tryggjaðu sær tó silvumerkini í HM-kappingini í Onglandi**

KAPPRÓÐUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin róði Katrin Olsen finalu í HM í Eton í Onglandi. Katrin er ein av fýra rógvarum umborð á danska dupultfýraranum, og tær høvdu vunnið sær pláss í HM-finaluni sunnudagin.

Í finaluni vísti kinesiski báturin ræðandi styrki og skúgvaðu alla mótstøðu til viks.

Kinesiski báturin legði seg á odda frá fyrsta árataki, og síðani øktu tær bara leiðsluna, til tær komu á mál fýra sekund frammanfyri Katrina og tær, sum blivu klárt nummar tvey og sostatt vunnu silvurmerki.

Kinesiski báturin setti eisini nýtt heimsmet við 6,23,96. Tær áttu eisini gamla metið, sum var 6,29,87 og sostatt kliptu tær seks sekund av metinum. Danski báturin kom á mál í tóiðini 6.28,16, so fittur munur var millum bátarnar.

Ta íð ein fjórðingur av teimum 2000 metrunum varð farin afturum, var kinesiski báturin 1,4 sekund frammanfyri tann danska, á hálva málinum var danski báturin 2,14 sekund aftanfyri, og tá ið tríggir fjórðingar vóru farnir, var frástøðan 3,6 sekund.

## Ætla at venja meira

Katrin Olsen staðfesti eftir finaluna, at tað var næsta ógjørligt at vinna á kinesiska bátinum hesaferð.

– Tær rógva sera væl umborð á kinesiska bátinum, men vit ætla ikki at geva skarvin yvir. Vit fara at venja miðvíst fyri at betra okkum, segði Katrin Olsen við Útvarpið í gjárkvøldið.

Hon vónar, at hon kann sleppa við til OL í Bejing í 2008. Tá verður róð í báti við tveimum rógvarum, og allar tær fýra umborð á dupultfýraranum eru áhugaðir í at sleppa við bátinum, sum skal umboða Danmark til OL.

Í næstum verður kappast um Danmarkarsmeistaraheitið, og tá skal Katrin aftur royna seg.

## Atli ætlar sær av landinum

**Tá seinasti dystur í ár er leiktur, pakkar landsliðsleikarin, Atli Danielsen, viðføri og fer til Danmarkar**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í farnu viku visti Sosialurin at siga, at landsliðsáleyparin, Christian Høgni Jacobsen, fer til Danmarkar, tá kappingin í ár er at enda komin. Nú sær út til, at Christian Høgni Jacobsen ikki verður einsamallur um at royna eydnuna á flatlondum.

Atli Danielsen hjá KÍ kann í dag vátta fyri Sosialinum, at hann eisini fer av landinum, tá KÍ hevur spælt seinasta dystin í ár.

– Jú, tað er rætt, at eg fari av landinum, tá steypa- og landskappingin er liðug. Unnustan fer niður at lesa, og eg fari niður við henni og ætli mær at spæla fótbólt har. Enn er onki ítøkiligt komið upp á pláss, men Jákup í Stórustovu hevur verið í samband við nøkur feløg í høvuðsstaðarøkinum, greiðir landsliðsleikarin Atli Danielsen frá.

Atli Danielsen ætlar sær í fyrstu atløgu at royna eydnuna sum fótbóltsleikari, men hugsar eisini um at fara undir lestur av onkrum slag seinni.

– Køge er eitt áhugavert felag, og Jákup í Stórustovu hevur verið í samband við teir, men har eru eisini onnur spennandi lið í høvuðsstaðarøkinum, sigur Atli Danielsen.

Útiseta fótbóltslívið er tó ikki heilt nýtt fyri Atla Danielsen, sum í fjør royndi seg eitt skifti í Noreg.

– Tað gekk ikki heilt sum ætlað í Sogndal. Eg var einsamallur, kendi ongan og tí riggaði tað onki serligt har. Men nú verður tað øðrvísi, tá eg fari niður við damuni og kenni fleiri onnur í Danmark. Tíðin í Sogndal var tó ikki til onga nyttu, tí eg lærdi eina rúgvu og fekk eisini nakrar royndir, ið eg kann taka við mær nú eg fari til Danmarkar, sigur hann.